

# EG VIL BARA FÁA FÓLK *at flenna*

**»EG ERI RÆTTILIGA LØGIN«**. SOLEIÐIS TEKUR 14 ÁRA GAMLI **KLÆMINT KLAKK** ÚR KLAKSVÍK TIL, IÐ EFTIR **ÓGVULIGA** STUTTARI TÍÐ ER VORÐIN EITT SERA **KENT** ANDLIT Í **FØROYUM**. TEIR SÍÐSTU TVEIR MÁNAÐIRNAR HEVUR KLÆMINT SKRIVAÐ **SANGIR** OG GJØRT EINA RÚGVU AV **STUTTLIGUM** OG ORIGINALUM **FILMUM**, SUM HANN HEVUR LAGT ÚT Á **YOUTUBE**. DAGLIGA ERU TAÐ VÆL **OMANFYRI** TÚSUND FÓLK, IÐ KLIKKJA Á **FILMARNAR** HJÁ KLÆMINTI. »EG YNSKI BARA AT VERA **STUTTLIGUR** OG FÁA FÓLK AT **FLENNA**« SIGUR KLÆMINT, IÐ **VERULIGA** HEVUR FINGIÐ VIND Í SEGLINI AT BLÍVA FØROYA NÆSTI **KOMIKARI**





**KOMIKARI**
Óli Jákup Jacobsen
post@sosialurin.fo

*Eg koyrdi for nógv smør uppá breyðið. Uhuu. So nógv at mamma mín hon segði. Uhuu. Smør tað veksur ikki á trøum. Uhuu. Jamen tað stendur í nógvum bløðum.*

Soleiðis ljóðar petti av fyrsta versi í best umtókta sanginum hjá Klæminti. Smørið er ein skeivur sangur við skeivum teksti og skeivum videolag, sum handlar um, hvussu nógv Klæmint elskar smør. Og tað er hann ikki einsamallur um. Tað eru nevniliga yvir 20.000 føroyingar, ið hava hugt eftir hesum løgna og stuttliga sangi á heimasíðunum Youtube og Facebook. Umframt smørið hevur Klæmint gjørt filmarnar Tær bestu Sólbrillurnar, Gangsta Sokkar, Klæmint & Bob og nógvar aðrar. Samanlagt eru hansara filmar blivnir hugdir eftir yvir 55.000 ferðir.

### Zacharias Hammer fekk áhugan at blomstra

»Eg havi altíð havt áhuga fyri at gera film. Áðrenn eg fekk útgerðina, sum eg havi í dag, brúkti eg mína fartelefon at filma við. Men tað var ikki optimalt. Tað var ikki, fyrr enn eg bleiv konfirmeraður í heyst, at eg fekk møguleikan at gera betri filmar,« sigur Klæmint, »eg fekk eitt filmstól frá mammu og babba í konfirmatiónsgávu, og fyri pengarnar eg fekk, keypti eg mær eina góða teldu.«

> **»** Tað var ikki fyrr enn eg bleiv konfirmeraður í heyst, at eg fekk møguleikan at gera betri filmar. Eg fekk eitt filmstól í konfirmatiónsgávu, og fyri pengarnar eg fekk, keypti eg mær eina góða teldu

»Í skúlanum skuldu vit hava eina serlærugrein, og hevði eg miðlar. Har sluppu vit at gera filmar, har eg m.a. spældi høvuðsleiklutir í ymsum filmum. Tá blomstraði áhugin fyri filmi veruliga, og tað at vit høvdu Zakaris Hammer til lærara gjørdi tað bara meira áhugavert,« sigur Klæmint.

### »Vit eru faktist tríggir«

»Mær dámar ógvuliga væl at gera løgin ting. Um eg skal siga tað sjálvur, so hugsi eg rættiliga skeivt og løgið,« sigur Klæmint og smílist. »Í skúlanum eri eg altíð tann, sum skal koma við einari býttari viðmerking til lærararnar. Onkuntíð fáa teir for nógv og blíva illir, men sum oftast fara teir bara sjálvir at grína,« sigur Klæmint og flennur.

»Tað vóru upprunaliga tveir vinmenn, Mikkjal Olsen og Tróndur Fuglø, sum byrjaðu okkara filmsframleiðslufelag FaroesePancakes, og kom eg uppí seinni. Endamálið var bara at gera filmar til okkum sjálvar og okkara vinfólk, sum vit kundu flenna eftir saman. Vit høvdu ongantíð nakrar planir um at røkka út í hvørja stovu og hvørt kamar í Føroya landi,« sigur Klæmint.

»Í okkara fyrsta filmi vóru vit allir tríggir við. Hann æt Uttandurasendingin og snúði seg um ting og sakir, sum ein kann gera úti. Vit ætlaðu at gera fleiri partar av Uttandurasendingini, men tað kom ongantíð longri enn til tann eina partin.«

»Tað vísti seg tíverri, at vit ongantíð høvdu tíð at gera film samstundis. Tá ein kundi, kundu hinir ikki, og tí kom ikki so øgiliga nógv burtur úr hjá okkum. Men eg vildi tó gera filmar, so eg fór í gongd við mín fyrsta film einsamallur við mínum nýggja útstýri. Eg spurdi so Mikkjal og Trónd, um eg bara kundi leggja filmin út gjøgnum FaroesePancakes, og tað høvdu teir einki ímóti. Síðani gjørdi eg ein film aftrat og ein triðja. Til síðst vóru tað næstan bara mínir filmar í felagnum.«

Spurdur um tað ikki er torført at